# Fakfelagsmanninum Karl Johansen til áminningar



Mangan kemur tað fyri, at júst tey, sum veruliga leggja ætlanir fyri einari innihaldsríkari pensjonistatilveru, gjarna ikki náa so frægt sum at seta hol á hana. Beint sum stríðsmaðurin Karl Johansen riggaði seg til at fara undir sín seinasta part av lívinum - eina friðsama pensjonistatilveru, var hansara lívstráður kvettur. Eitt otium uttan drúgvar samráðingar, eitt otium uttan eitt 8 til 5 arbeiði, eitt otium saman familjuni og eitt otium, har tíð gavst til tað, sum áhugin var fyri, men sum fyrst nú veruliga stundir góvust til. Og løgið var tað kortini, at júst hesin maðurin, sum serliga gjørdist kendur sum forsprákarin fram um aðrar fyri, at hansara limir skuldu fáa tað eisini fíggjarliga rúmsátt sum pensjonistar, náddi als ikki sjálvur at gera brúk av tí skipan, sum fer at standa sum ein stoltur varði yvir hansara drúgva arbeiðsdag sum fakfelagsmaður.

Seinast eg fekk høvið prátað við Karl, var beint fyri jól, tá Havnar Arbeiðsmannafelag hátíðarhelt, at hann hevði sitið sum formaður í samfull 25 ár. Í hugnaligum umhvørvi við jólagløggi og holukøkum sat hesin erligi og vinsami stríðsmaðurin og hugnaði sær saman við mongu gestunum, sum møttu fyri at ynskja honum tillukku. Sum vera man vóru eisini mangar røður. M.a. bar hansara mótstøðumaður í mongum samráðingum, Poul Mohr fram eina sera beinrakna røðu. Hann nevndi m.a. tvey viðurskifti, sum lýstu Karl sera væl. Fyri tað fyrsta, at hann var álítandi. Hevði tú gjørt eina avtalu við hann, so helt hon. Fyri tað næsta, so kallaði hann Karl ein skilamann. Hetta serføroyska fyribrigdið - ein skilamaður. Ein maður, sum dugur tað, hann skal.

Tíbetur eydnaðist eisini mær at koma at kenna Karl, tó ikki í so drúgva tíð. Men m.a. mintist eg frá mínari tíð í landsstýrinum, at Karl bar við sær ein dám av tí ektaða og óforfínaða. Hann var maðurin, sum við sínum spontana verumáta var eitt stolt umboð fyri sínar limir. Hann kundi minna bæði okkum politikkarar og uttan iva eisini embætisfólkini á, at tað eisini var eitt lív uttan fyri bonaðu gólvini í Tinganesi.

Og tvær ferðir fekk eg vístan tann stóra heiður at bera fram eina røðu á arbeiðaradegnum 1. mei saman við Karl og øðrum góðum fólkum. Fyrst ferð í 1995 og seinnu ferðina í fjør. Men báðar ferðirnar í ringasta óveðri við bæði vindi og regni. Og her stóð hesin stolti fakfelagsmaðurin, sum hesa løtuna bæði skuldi stríðast móti veðurgudunum, politikkarunum og arbeiðsgevarunum. Men tað var kanska rætta myndin, vit fingu av Karl hesar løtur. Í andglettinum, men fullur av stríðsvilja og góðum vónum. Tí konstruktivur var hann sum fáur. Hann kendi sín leiklut, men hann virdi eisini leiklutin hjá øðrum, eisini sínum mótstøðufólkum. Og tað er uttan iva eisini røttu eginleikarnir hjá einum góðum fakfelagsmanni.

Vit í Føroya Javnaðarflokki minnast Karl Johansen við størstu virðing.

**Jóannes Eidesgaard**
**floksformaður**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum við vitjanum, telefonuppringingum og á ymiskan hátt hjálptu og vístu samkenslu, tá ið elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara,

**Petur Ludvig**

brádliga doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.

Tøkk til prest fyri troystarrík orð, tøkk til sangarar og teir, sum spældu á ljóðføri, tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarðandi*
**Sigrid Ludvig við familju**

## Ársaðalfundur

**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka**

**fríggjadagin 22. mars 2002 kl. 17.00**

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapin.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot um, at nevndin fær heimild til innan endan av mars 2003 at lata bankan ognast upp til 1 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst.
7. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi mánadagin tann 18. mars 2002.

Tórshavn, tann 21. februar 2002.

NEVNDIN

FØROYA BANKI

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Hjørdis Hansen**
f. Matras
á Norðoyri

andaðist og fór til gravar.

Tøkk til tykkara, sum vóru so góð við mammu til tað seinasta. Tøkk fyri heilsanir og fyri gávurnar til Norðoya Røktarheim.

Eisini ein tøkk til tykkara, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og til tykkara, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Eina serstaka heilsan og tøkk senda vit tykkum á Norðoya Røktarheimi fyri, at tit hava farið so væl og kærleiksfult um mammu tey árini, hon var hjá tykkum.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**

## Tøkk

Vit takka øllum hjartaliga fyri sýnda samkenslu tá okkara kæra

**Brynhild Larsen**
Tórshavn

doyði og bleiv jarðað.

Takk til prestin, Hera Joensen, fyri hjálp og troystarrík orð.

Takk fyri blómur og kransar og uppringingar.

Eina serstaka tøkk til tykkum á B8 á sjúkrahúsinum, ið vóru um hana ta seinastu sváru tíðina.

*Familjunnar vegna*
**Lars, Marita og Annika**




# Hevur tú hug at leiða hendan her - her..?



Sum nakað heilt nýtt letur heimskenda ketan Burger King sína fyrstu deild upp her í Føroyum og beint í hjartanum í høvuðsstaðnum - SMS. Ætlanin er at lata upp í september, og tí sambandi verður søkt eftir einum leiðara og trimum varaleiðarum at seta í starv, longu nú.
Tað vit bjóða er eitt spennandi framtíðarstarv við nógvum møguleikum í eini heimskendari fyritøku. Hetta er júst tað, sum tú altíð hevur droymt um...

**Leiðari:** Søkt verður eftir einum leiðara M/K at hava ábyrgdina av Burger King matstovuni og øllum starvsfólkunum, ið koma at starvast har. Ert tú yvir 20 ár, opin, virkin, røkin, sjálvstøðugur og tað, ið krevst, fyri at gerast ein góður leiðari, so ert tú kanska tann, vit leita eftir.
Og hevur tú fíggjarligan kunnleika, er tað bara ein fyrimunur.
At arbeiða miðvíst og taka avgerðir, samstundis sum tú heldur fýra bóltum í luftini, er avgjørt tín styrki. Tú heldur, eins og vit, at tú og tíni starvsfólk skulu verða eitt vælleikandi lið, har tú ert liðskiparin.
Tú ert klár/ur at fara avstað, tá vit bjóða tær til Svøríkis í uml. 5 mánaðar at arbeiða og útbúgva teg hjá Burger King.
Sum leiðari í Burger King verður tú av og á eisini send/ur á skeið uttanlands fyri at menna teg og títt lið...

**Varaleiðarar:** Søkt verður eftir trimum varaleiðarum til Burger King matstovuna í SMS. Tey, ið sett verða, hava somu eginleikar, sum leiðarin sjálvur.
Starvið inniber eitt uppihald í Svøríki í uml. 3 mánaðar, har tú skal arbeiða og útbúgva teg hjá Burger King. Tú ert klár/ur at fara avstað, tí slíkar avbjóðingar eru júst nakað fyri teg....

*Sært tú teg sum leiðara ella varaleiðara, so send eina umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum til:*
***Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn***
***Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2002.***

BURGER KING

Burger King • SMS • Postboks 1059 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 30 41 • Fax 31 74 30

petur & petur • 320870